# Viðtøkur fyri Tórshavn Boksing

**§ 1 Navn og heimstaður.**
Navn felagsins er Tórshavn Boksing, og heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2 Endamál.**
Endamálið hjá Tórshavn Boksing er at menna og fremja boksing sum ítrótt í Tórshavn. Felagið virkar fyri at styrkja samanhaldið millum ung og skapa eitt trygt og inkluderandi umhvørvi, har sosial virði standa í hásæti. Í Tórshavn Boksing er **rúm fyri øllum** – vit leggja stóran dent á trivnað og felagsskap.

**§ 3 Limaskapur.**
Ein og hvør kann gerast limur við at venda sær til annaðhvørt ein nevndarlim ella venjara. Øll hava møguleika at royna venjingina í 1 viku, hereftir skal limagjald gjaldast. Ein samd nevnd kann nokta persóni limaskap. Verður persóni noktaður limaskapur, kann hann leggja spurningin fyri fyrstkomandi aðalfund til støðutakan. Feløg og onnur áhugaði, kunnu gerast hvílandi limir.

Nevndin ásetur støddina á limagjaldinum fyri virknar-, hvílandi- og ungdómslimir. Limagjaldið verður sett eftir hvat mett er rímuligt. Limur kann til eina og hvørja tíð siga limaskap sín upp, men inngoldið limagjald verður ikki afturgoldið. Nevndin kann koyra lim úr felagnum, um viðkomandi er í eftirstøðu við limagjaldi í meira enn 1 ár, hevur brotið viðtøkur felagsins ella á annan hátt grovt hevur forbrotið seg, eitt nú um hann hevur útnytta boksivenjingina uttanfyri venjing. Viðkomandi limur kann leggja spurningin fyri fyrstkomandi aðalfund til støðutakan.

**§ 4 Aðalfundir.**
Aðalfundurin, sum verður hildin í heimstaði felagsins, er hægsti myndugleiki felagsins. Ársaðalfundur verður hildin áðrenn Juni mánaður er farin.

Nevndin kallar inn til aðalfundar skrivliga og/ella við uppslagi við í minsta lagi 14 daga varningi. Í innkallingini skal verða sagt frá fundarstaði, -tíð og -skrá.

Mál, sum limir vilja hava til viðgerðar, skulu vera nevndini í hendi í minsta lagi 12 dagar undan aðalfundinum. Í fundarboðunum verða innkomin mál stutt endurgivin, men skulu liggja frammi í fullum líki á skrivstovu felagsins í minsta lagi 8 dagar undan fundinum.

Á ársaðalfundinum er fundarskráin hendan:
* Val av fundarstjóra.
* Frágreiðing nevndarinnar fyri farna árið.
* Framløga av roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
* Val av nevndarlimum og tiltakslimum.
* Val av grannskoðara. Roknskaparkønum (Menta)
* Innkomin mál.
* Ymiskt.

Fundarstjórin ger av í øllum ivaspurningum á fundinum. Hann kann vera nevndarlimur.

Atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, um ikki aðalfundurin góðkennir annan atkvøðuhátt. Atkvøðast kann sambært fulltrú. Fundarstjórin ger av gildi hennara.

Bert limir, sum hava fylt 14 ár, hava atkvøðurætt. Valbærur er limur, sum er fyltur 18 ár. Hvílandi limir hava møti- og talurætt, men tó ikki atkvøðurætt.

**§ 5 Eykaaðalfundir.**
Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið nevndin heldur tað vera neyðugt ella tá ið ein triðingur av limunum krevja tað. Mannagongdin á eykaaðalfundi er tann sama sum á ársaðalfundi.

**§ 6 Nevndin**
Felagið verður stýrt av eini 5 manna nevnd. Nevndarlimir verða valdir annaðhvørt ár. Soleiðis at annaðhvørt ár standa 1 (ella fleiri ) fyri vali og annaðhvørt ár standa 2 (ella fleiri) fyri vali. Nevndin skipar seg sjálv. Tiltakslimir verða valdir fyri sama tíðarskeið. Nevndin heldur fund, so ofta hon heldur tað vera neyðugt. Nevndin er viðtøkufør, tá ið 3 nevndarlimir eru á fundi.

Nevndin kann gera reglugerð fyri virksemi sítt. Fer nevndarlimur frá í úrtíð, kemur fyrstvaldi tiltakslimur í hansara stað. Gerðabók verður førd fyri allar aðal- og nevndarfundir.

**§ 7 Tekningarreglur.**
Felagið verður teknað av samlaðu nevndini. Til keyp, sølu ella veðseting av føstum ognum krevst aðalfundarsamtykt.

**§ 8 Heftilsi.**
Felagið heftir bert fyri skyldum sínum við teimum til eina og hvørja tíð verandi ognum, sum hoyra felagnum til. Limirnir ella nevndin hefta ikki persónliga fyri felagsins skyldum, men bert við sínum limagjaldi.

**§ 9 Roknskapur.**
Roknskaparár felagsins er vanligt álmanakkaár. Fyrsta roknskaparár er frá stovnan felagsins og til 31-12-2017.

Roknskapurin verður grannskoðaður av einum roknskaparkønum á aðalfundi valdum grannskoðara, sum hevur rætt at kanna felagsins bøkur og skjøl, tá ið hann ynskir tað.

**§ 10 Viðtøkubroytingar.**
At broyta viðtøkurnar krevst, at í minsta lagi 2/3 av møttu limunum atkvøða fyri.

**§ 11 Avtøka.**
At taka felagið av krevst, at í minsta lagi 2/3 av limum felagsins eru á fundi og samstundis eisini atkvøða fyri. Er ikki neyðugi meirilutin av limunum á fundi, kann nevndin kalla inn til eykaaðalfundar, har felagið kann verða tikið av, um 2/3 av givnum atkvøðum eru fyri, líkamikið hvussu nógvir limir eru møttir.

Verður felagið tikið av, velur aðalfundurin ein ella fleiri likvidatorar. Eitt møguligt avlop skal nýtast til eitthvørt ítróttarligt ella vælgerandi endamál.

Soleiðis samtykt á aðalfundi

Tórshavn tann 23. apríl 2025

Nevndin í Tórshavn Boksing